# r Rás 2 sum útvarpsstøð



*Tann privati útvarpsstjórin við rack'ið sum er hjartað í sendivirkseminum hjá Rás 2; her stillar hann upp á modulatiónina eftir boðum frá Fjarskiftiseftirlitinum.*

*Foto: Jens Kristian Vang*




*Foto: Jens Kristian Vang*

á Rás 2 ikki, trupuleikin er í hansara eygum heldur at núverandi útvarpsleiðsla er uppvaksin við at vera einsamøll og tá nú onkur annar kemur inn á 'teirra øki' eru tey ikki von ella búgvin at fyrihalda seg til hetta.

»Samstarv hevði gagnað øllum pørtum, og tað er skeivt at skúla útvarpsfólk við at Rás 2 er av tí ónda… Fólk blanda ofta tingini saman tá tey tosa um Rás 2 í mun til tað almenna Útvarpið, sum um at talan var um kappingarneytar. Tað er tað jú ikki, í øllum førum skal tað ikki vera so. Tað almenna Útvarpið er ein stovnur ið av tí politiska myndugleikanum er settur til at røkja nakrar heilt serligar 'public service' uppgávur, meðan Rás 2 er ein privat støð ið av sínum eintingum sendir pop og annað tilfar, mest tílíkt ið verður nevnt undirhalds útvarp. Meðan tað almenna Útvarpið verður fíggjað við hjálp av lógarfestum lurtaragjaldi umframt eyka inntøkum frá lýsingum og øðrum virksemi, so hevur Rás 2 ikki annað enn serligan sjálvbodnan stuðul og tær lýsingar vit megna at selja.«

Hetta er væl ikki annað enn rímiligt?

»Tað skuldi tað verið, men í lógini um kringvarp frá 1997 er lagt upp til at somu treytir skulu galda fyri privatar og almennar støðir, tó við tí undantaki at tær privatu mugu sjálvar klára seg fíggjarliga – og so kemur tann avgerandi skeivleikin sum koppar allari javnvág – samstundis sum tey alment fíggjaðu vørpini hava fingið fríar hendur at kappast ímóti okkum um tær handilsligu lýsingarnar. Eg haldi hetta má vera eitt mál fyri Kappingarráðið, og hetta líkist í øllum førum ikki nøkrum ið kann kallast rímiligt!«

Petur Jacobsen telist millum teirra ið meta at avleiðingarnar av at lata teir almennu loftmiðlarnar kappast móti privatum støðum og øðrum miðlum um tær handilsligu lýsingarnar, síggjast aftur í útboðnum; hann meinar at tey almennu vørpini hava fingið lyndi til at ganga burtur frá sínum public service uppgávum fyri at ístaðin at leggja seg meira eftir at senda pop og undirhald. Hetta er ein gongd sum skaðar allar partar, meinar Petur Jacobsen, í og við at ein public service støð eigur sítt trúvirði og sítt grundarlag í júst public service við tilhoyrandi kravi um journalistiska dygd og óheftan tíðindaflutning. Hann ávarar í hesum sambandi ímóti at destruktivt máa støðið undan tí dygdargóða public service varpinum, samstundis sum hann metir at marknaðurin hjá teimum kommerciellu, sum ikki hava annað livibreyð enn lýsingarnar, verður órógvaður av ójavnari kapping.

»Eg haldi hetta málið um føroyskar loftmiðlar liggur politiskt í hálvum gekki og eingin greið ætlan tykist fyriliggja heldur. Hvat vilja vit føroyingar? Nú ÚF og SvF verða løgd saman, verður tað vónandi so at politikararnir taka eina greiða støðu og leggja eina linju fyri hvat vit vilja við almennum loftmiðlum í Føroyum, herundir um vit yvirhøvur vilja at alternativar ella privatar støðir skulu hava umstøður at virka undir.«